# Álit

# í

**løgtingsmáli 052/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit** (Atgongd hjá ríkismyndugleikum til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum)

Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum hevur lagt málið fram tann 28. november 2025, og eftir 1. viðgerð tann 9. desember 2025 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 13. januar, 10. og 17. februar 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í uttanríkis- og mentamálum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Sambært galdandi løgtingslóg um fólkayvirlit er eingin heimild at lata ríkismyndugleikum í Føroyum upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum. Ríkismyndugleikarnir eru Ríkisumboðið, Føroya Politi, Føroya Rættur, Kriminalforsorgin, Landslæknin og Arktisk kommando. Hesir stovnar kunnu sum er ikki brúka Talgildu Føroyar til sjálvavgreiðslur á Vanganum ella til at senda brøv í Mínbok.

Fyri at hetta kann lata seg gera, er tað ein fortreyt, at hesir stovnar fáa atgongd til neyðugar upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum, tí talgildu loysnirnar eru knýttar í upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum. Neyðugt er tí við hesi lógarbroytingini, fyri at geva hesa heimildina.

Rættarnevndi sær onga orsøk vera til, at hesir stovnar ikki kunnu nýta skipanir, ið eru mentar til at veita tænastur í føroyska samfelagnum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Rættarnevndin, 17. februar 2026**

| | | |
|---|---|---|
| Helgi Abrahamsen<br>formaður | Erling Eidesgaard | Ingilín Didriksen Strøm |
| Kristianna W. Poulsen | Henrik Old | Steffan Klein Poulsen |
| | Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur | |